

TELEVARPIÐ ELVIR TIL ELD

*Tað var ein móttakari hjá Televarpinum, sum var orsøkin til at eldur kom í hesi húsini á Stykkinum fyri einum ári síðani. Og í summar var sama skilið í Kvívík og nú kanna Brunaumsjónin og Televarpið málið til botns*

# Øgiliga alvorligt

- Hetta er øgiliga alvorligt fyri okkum og vit vilja fegin koma til botns í hesum.

Tað staðfestir Edvard í Skorðini Joensen, stjóri í Televarpinum.

Hann hevur eisini sæð frágreiðingarnar frá løgregluni og úrslitið av kanningunum, sum eru gjørdar.

Hann sigur, kortini, at tað er neyðugt at finna ein samanhang í tí, sum er hent.

Í hesum sambandi gevur Televarpið løgregluni so nógvar upplýsingar, sum til ber.

- Vit vita ikki, hví skammlop er í móttakarunum, men tað kanna vit í løtuni.

- Spurningurin er um orsøkin til hetta, er óreglusemi í streymveitingini frá Sev. Vit vita heldur ikki um orsøkin er, at toran hevur sligið niður ella um talan veruliga er um brek í móttakarunum.

Men stjórin í Televarpinum vísir á, at báðu ferðina er talan um móttakarar í sama øki Hann veit eisini, at tað er ein vanligur trupulleiki, at streymforsýningar í tólum fara.

Og hann hevur í øllum førum staðfest, at dagin fyri eldsbrunan í Kvívík, var streymslit í bygdini og tað kann elva til trupulleikar.

**Ómøguligt at siga**

Men kann talan vera um, at hetta slagið av móttakarum eru serliga viðbreknir?

- Tað er ómøguligt at siga. Vit hava yvir 9000 viðskiftafólk og nógv teir flestu móttakararnir eru av slagnum Force. Tí eru sannlíkindini rættiliga stór fyri, at tá ið nakað hendir, eru tað okkara viðskiftafólk, sum verða rakt. Men veruleikin er, at vit vita ikki, hvat er hent og tað royna vit at fáa greiði á.

- Sjálvandi hava vit ábyrgdina av teimum móttakarum, vit selja og tá ið vit hava fingið staðfest orsøkina til hesi skammlopini, taka vit støðu til málið og tá kann talan verða um at vit venda okkum til framleiðaran við trupulleikanum at vita, um nøkur brek kunnu staðfestast við móttakarunum.

Men hvat gera tit, skuldi tað víst seg, at móttakararnir hava brek, sum kann elva til skammlop? Fara tit so at kalla teir inn aftur?

- Tað veit eg ikki. Vit eru í ferð við at dagføra Televarpið so at myndagóðskan verður betri og í tí sambandinum skulu móttakararnir skiftast. Og vísir tað seg, at móttakararnir veruliga hava eitt brek, vænti eg heldur, at vit fara at geva okkara viðskiftafólki serliga góð tilboð upp á at skifta móttakararnar í samabandi við dagføringina, sigur Edvard í Skorðini Joensen.

**» Tað kann bjarga mannalívi at taka stikkið úr kontaktini, tá ið sjónvarpið ikki verður brúkt**

# Elektrisk tól skulu sløkkjast

Michael Gram, politistur sigur, at moralurin av eldsbrununum á Stykkinum og í Kvívík, má vera, at vit skulu læra okkum at ansa betri eftir teimum elektrisku tólunum.

Tummilsreglan má vera, at tá ið vit ikki brúka tólini, skulu vit sløkkja kontaktini á vegginum, so at ongin streymur sleppur til tey.

Tað ger eisini, at tólini halda longri og eru betri vard fyri brekum, sum standast av ójavnum spenningi.

Tað finnast eisini spariskinnarar, har tú kanst sløkkja streymin til øll tólini bara við at trýsta á eina kontakt.

Sjálvur hevur Michael Gram ein "TV Control Socket" har hann bara skal sløkkja á fjarstýringina, so slóknar streymurin eisini til móttakaran og øll onnur tól, sum eru bundin í.

Men hjá tí, sum ikki hevur nakað slíkt eru hyggjuráðini: Tak stikkið úr kontaktini, tá ið sjónvarpið ikki verður brúkt.

Tað kann skjótt bjarga mannalívi!

Hetta eru eisini eini ráð, sum Edvard í Skorðini Joensen, stjóri í Televarpinum tekur til sín.

- Eru fólk ikki trygg við støðuna, er at taka stikkið úr kontaktini, tí so er ongin streymur til tólini.

- Tað sparir eisini streym, umframt at tólini halda longri, sleggur hann afturat.



**» Er tað veruliga ein feilur í móttakarunum, er allar orsøkir til at vera á varðhaldi**